# SEV: Hetta er at gera ein mýggjabita til ein bláhval

**Næstformaðurin í umboðsnevndini hjá SEV heldur at málið um SEV er blást og nógv upp**

SEV
*Áki Bertholdsen*

– Eg ætli mær at siga mína meining á fundinum.

Absalon í Buð er næstformaður í umboðsnevndini hjá SEV.

Men hann hevur ongar viðmerkingar til málið um trupulleikarnar hjá SEV stjóranum og stýrinum, sum formaðurin í umboðsnevndini, Hans Tausen Olsen, nú ætlar at taka upp í umboðsnevndini.

Hans Tausen Olsen heldur, at SEV stjórin hevur ein gegnistrupulleika, tí umframt at vera SEV stjóri, er hann eisini formaður í nevndini fyri Vágatunnilin. Og í SEV hevur hann verið við til at viðgjørt mál, sum viðvíkja Vágatunlinum.

Samstundis heldur formaðurin fyri umboðsnevndini, at SEV stýrið hevur ein trupulleika, tí tað hevur góðkent leiklutin hjá stjóranum.



*Absalon í Buð heldur, at málið um gegnistrupulleikarnar hjá SEV-stjóranum er handfarið púra skeivt*

Men tað skilst, at tað eru ikki øll, sum eru so heilt samd við formanninum í umboðsnevndini.

Ein av teimum, sum, í hvussu so er ikki treytaleyst, tekur undir við sjónarmiðjunum hjá Hans Tausen Olsen, formanninum fyri umboðsnevndini, er Absalon í Buð, sum er næstformaður í umboðsnevndini.

Hann sigur, at alment hevur hann ongar viðmerkingar til málið.

– Eg fari at siga mína meining á fundinum, men heldur ikki fyrrenn tá.

– Ongin hevur sett seg í samband við meg um nakað sum helst og eg ætli mær ikki at siga mína meining fyrrenn á fundinum.

Men hann sigur kortini so mikið sum tað, at eftir hansara tykki er hetta málið at blása ein myggjabita upp til ein heilan bláhval.

Og hann heldur eisini, at handfaringin av hesum málinum hevur verið heilt skeiv.

Men at útgreina hesi úttalsini nærri, vil hann ikki.

Men hann fær mannagongdina í hesum málinum illa at samsvara við politikkin hjá umboðsnevndarformanninum í øðrum málum.

– Nakrar ferðir hevur uppskot verið frammi um at gera umboðsnevndirnar hjá SEV almennar.

Men tað hevur Hans Tausen Olsen heilt avgjørdur verið ímóti fyri at hava tað, sum fer fram á umboðsnevndunum fyri afturlætnum hurðum og krógvað fyri almenninginum.

– Tað fái eg illa at samsvara við, at hann nú einsamallur leggur alt tilfar um stjóra og stýrið út á blik fyri almenningium, sigur Absalon í Buð.

Men fær Hans Tausen Olsen ikki undirtøku í nevndini fyri sínum sjónarmiðjum. Eigur hann so at fara frá?

Tað má standa til hann sjálvan. Eg vildi ikki mett, at nevndin fór at koyra hann frá, hóast hon ikki skuldi tikið undir við honum í hesum málinum, sigur Absalon í Buð.

# Nýggi borgarstjórin á Tvøroyri góðkendur

**Kommunudeildin í Løgmálaráðnum góðkennir borgarstjóraskiftið á Tvøroyri í farnu viku**

BORGARSTJÓRASKIFTIÐ
Áki Bertholdsen

Kommunudeildin í Løgmálaráðnum ger onki við borgarstjóraskiftið á Tvøroyri í farnu viku.

Tað sigur Hilmar Høgenni, leiðari á kommunudeildini.

Hann sigur kommunudeildin hevur fingið ymiskt tilfar um málið og eftir tí er onki grundarlag hjá kommunudeildini at taka nøkur stig í málinum.

Tað var í farnu viku, at Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri síðani kommunuvalið í 2000, boðaði býráðnum frá, at hann vildi sleppa frá sum borgarstjóri.

Tað samtykti býráðið og valdi í sama viðfangi Kristin Michelsen til nýggjan borgarstjóra tey bæði árini, sum eru eftir av hesum valskeiðnum.

– Vit hava kannað gerðabókina hjá kommununi og eftir henni er onki grundarlag at fara víðari við málinum, tí tað er borgarstorin sjálvur sum bað um at vera loystur úr starvi.



*Kommunudeildin hjá løgmálaráðnum hevur nú góðkent, at Kristin Michelsen kann taka við sum borgarstjóri á Tvøroyri*

Hilmar Høgenni sigur, at Tvøroyrar Kommuna hevur ikki fingið niðurstøðuna skrivliga enn, men tað fær hon.

### Lógin verjir borgarstjórar

Annars stendur í kommunulógini, at borgarstjórar eru valdir fyri alt valskeiðið.

Men hetta er fyri at verja borgarstjórarnar.

– Tað verður stór ábyrgd løgd á borgarstjórarnar. Eitt nú mugu teir siga síni borgarligu størv frá sær. Tí eru teir tryggjaðir í kommunulógini, so at teir ikki kunnu vera koyrdir frá uttan so, at teir misrøkja sínar skyldur ella gera okkurt revsivert, ella aðrar álvarsligar orsøkir eru fyri tí.

Tað skal sostatt ikki bera til hjá einum meiriluta í einum býráði at koyra ein borgarstjóra frá, bara tí at hesin meirilutin er misnøgdur um eitthvørt politiskt mál, ella um okkurt annað viðvíkjandi borgarstjóranum.

– Men hinvegin kunnu borgarstjórar sjálvir søkja býráðið um at verða loystir úr starvi, men so skal í býráðið samtykkja at hann kann sleppa frá.

Hilmar Høgenni sigur, at tað er hetta, sum er hent í hesum føri, nú tvøráfólk fingu nýggjan borgarstjóra og tí ger kommunudeildin ikki meiri við málið.

### Ólóglig avtala

Borgarstjóraskiftið á Tvøroyri fellir merkiliga væl saman við eini avtalu, sum varð gjørd, tá ið býráðssamgongan varð skipað eftir kommunuvalið í 2000.

Tá skipaðu teir tríggir býráðslimirnir fyri javnaðarflokkin býráðssamgongu, saman við tí eina umboðnum hjá sambandsflokkinum og umboðnum hjá uttanflokkalistanum. Sostatt hevði samgongan fimm býráðslimir.

Tveir býráðslimir endaðu í andstøðu og teir vóru umboðið hjá tjóðveldisflokkinum og fólkaflokkinum.

Men tað stóð nógv á at skipa samgonguna, tí stríð var um at fáa borgarstjóran. Tað endaði við eini avtalu, har Finnleif Guttesen úr sambandsflokkinum skuldi vera borgarstjóri tey bæði fyrstu árini og Kristin Michelsen úr uttanflokkalistanum tey bæði seinnu árini.

Men Kommunudeildin hjá løgmálaráðnum boðaði frá at tað var ólógligt at gera slíkar avtalur og eftir tað kunngjørdi býráðssamgongan, at avtalan varð annulerað.

Men nú tvey ár eru farin av býráðsskeiðnum, hendir kortini akkurát tað sama, sum upprunaliga avtalan segði.

Men bæði fráfarni og nývaldi borgarstjórin bedýra, at skiftið hevur onki við avtaluna at gera.

Hilmar Høgenni hevur onga viðmerking til hetta. Tað einasta hann kann siga, er, at tað er borgarstjórin, sum hevur biðið um at verða loystur úr starvi og at tað ikki ber til at siga, at tað byggir á nakra avtalu.

Men hetta málið vísir so eisini, at tá í samgongur verða skipaðar í bý- og bygdaráðum, ber í hvussu so er til at gera munnligar avtalur um at borgarstjórastarvið skal ganga upp í skift.



# 2003 er ár teirra brekaðu

*Árið í ár er ár teirra brekaðu. Settur er ein stýrisbólkur við umboðum úr samfelagnum, sum skal skipa fyri tiltøkum. F.v. Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, Marjun Sigurðardóttir, forkvinna í MBF, Doris Hansen, formaður í stýrisbólkinum, Kristianna Winther Poulsen, umboð fyri Almannaráðið og Malan Johansen, umboð fyri Vinnuhúsið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Føroya Landsstýri hevur gjørt av, at ár 2003 skal vera ár teirra brekaðu. Settur er ein stýrisbólkur, sum kemur at skipa fyri tiltøkum ígjøgnum árið, og skal hetta vera við til at varpa ljós á støðuna hjá brekaðum**

ÁR TEIRRA BREKAÐU
*Ingrid Bjarnastein*

Viðurskiftini hjá teimum brekaðu verða sett á dagsskránna í ár. Hetta hevur Føroya Landsstýri avgjørt. Settur er ein stýrisbólkur, sum skal skipa fyri tiltøkum ígjøgnum árið, og verður eisini pláss til einstaklingar ella feløg at koma við uppskotum til tiltøk.

– Hetta skal vera við til at varpa ljós á støðuna hjá teimum brekaðu, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum.

– Vit skulu royna at fáa arbeiðsmarknaðin betri skipaðan, og um eg so má siga, at røkja sínar skyldur. Tey brekaðu skulu ikki verða eitt hjól fyri seg, men skulu vera við í tí samlaða samfelagshjólinum.

Við í stýrisbólkinum, eru umboð fyri ymsar bólkar í samfelagnum. Umboð fyri MBF, Vinnuhúsið, Landsverksfrøðingin, Almannaráðið, Ráð teirra brekaðu og arbeiðsgevararnar eru við í bólkinum.

– Okkara fyrsta ætlan er at fara út at ferðast kring landið. Hetta fyri at skapa áhuga og fyri at geva átakinum gætur, sigur Kristianna Winther Poulsen, sum umboðar Almannaráðið.

– Viðurskifti, atkomumøguleikar og annað verður sett undir lupp, og tað, at fólk við breki ikki kunnu ferðast, tí møguleikarnir eru avmarkaðir.

Tað verður í mei, at stýrisbólkurin fer út kring oyggjarnar á eina, sum kanska kann kallast eina kunningarferð.

### Ráðstevna

Fyribils ætlanirnar eru síðani at skipa fyri eini ráðstevnu seinni í heyst. Ráðstevnan kemur at viðgera livikor teirra brekaðu, og skal hon skipast undir so breiðum samstarvi sum møguligt. Og í desember verður skipað fyri einum pallborðsfundi.

– Vit fara at gera eina 10 ára ætlan yvir, hvat skal henda. Vit vilja hava eina skipaðan politikk og eitt úrslit, greiðir Kristianna Winther Poulsen frá.

Stuðulin kemur frá landsstýrismanninum í almannamálum. Einstaklingar ella feløg, ið hava hug til at skipa fyri onkrum í sambandi við ár teirra brekaðu kunnu seta seg í samband við stýrisbólkin, sum síðani viðmælir landsstýrismanninum, Páll á Reynatúgvu, at veita stuðul.

– Viðurskiftini hjá teimum brekaðu skulu inn á aðrar gøtur at ganga á. Tað nýtist ikki at vera tann formaliseraði parturin av einum felagið, sum skipar fyri tiltøkum, men fólk, sum tú og eg, sigur Páll á Reynatúgvu.

1981 var ST-ár teirra brekaðu, og var hetta eisini í Føroyum. Eisini tá varð gjørd ein tíggjuáraætlan, har limirnir í stýrisbólkinum í dag kunnu peika á úrslit, sum eru komin burturúr.

– Fyrr vóru tey brekaðu ikki ein partur av samfelagnum. Tað eru tey í dag. Tey vóru ikki sjónlig fyrr, men tað eru tey nú. Og tað er ein hugburðsbroyting, sum skal til. Til dømis tá hugsað verður um atkomiligheit. Um ætlanirnar verða tilrættislagdar á rættan hátt, so nýtist tað ikki at koma at kosta nakað eyka, tí tað skal vera grundarlagið undir ætlanunum av fyrstan tíð, sigur Marjun Sigurðardóttir, formaður í MBF, sum í stýrisbólkinum umboðar felagið.

Í dag er tað náttúrligt at tosa um tey brekaðu. Og eisini í fjølmiðlunum er tað nú nakað, sum er púra vanligt.

Til tiltøk og upplýsing eru játtaðar 300.000 krónur. Harumframt kemur kostnaðurin av ráðstevnuni afturat.

### Óbrúkt tilfeingi

Umboðið fyri arbeiðsgevararnar, Malan Johansen, úr Vinnuhúsinum, sigur, at tað er tørvur á fleiri fólki á arbeiðsmarknaðinum, og har eru tey brekaðu eitt tilfeingi, sum ikki er fult útnyttað.

Tommy Petersen, sum umboðar Ráð teirra brekaðu, í stýrisbólkinum, sigur, at við tað, at ein betrar um viðurskiftini fyri brekað, so betrar ein eisini um viðurskiftini hjá teimum, sum ikki hava brek.

– Hetta er nakað, sum kann vera til gagns fyri okkum øll. Kanska ikki í dag, men næstan øll fáa smærri brek við aldrinum, og onkur kanska eisini í einum óhappi av einum ella øðrum slag, sigur Tommy Petersen.

Stýrisbólkurin fer í gongd við arbeiðið beinanvegin. Í mei verður farið kring landið at ferðast. Stýrisbólkurin væntar, at fólk og feløg fara at vísa áhuga og skipa fyri tiltøkum, so árið veruliga verður við til at varpa ljós á tey brekaðu.

– Tey brekaðu eru so nógv. Ikki bara tey, sum sita í koyristóli ella er menningartarnað. Tað eru eisini tey, sum hava astma ella eru ovurviðkvom. Tey, sum hava cøliaki og skulu hava matpakka við tá tey skulu í føðingardag, sigur Marjun Sigurðardóttir at enda.



*Stýrisbólkurin fer beinanvegin til verka.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Stýrisbólkurin

Stýrisbólkurin, sum Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum hevur avgjørt at seta er mannaður av:

- Doris Hansen, forkvinna og umboð fyri Mentamálaráðið
- Malan Johansen, umboð fyri arbeiðsgevararnar, Vinnuhúsið
- Suni Dalsgaard, umboð fyri Landsverksfrøðingin
- Marjun Sigurðardóttir, umboð fyri MBF
- Tommy Petersen, umboð fyri Ráð teirra brekaðu
- Steinbjørn Jacobsen, umboð fyri Ráð teirra brekðu
- Ingeborg Vinther, umboð fyri arbeiðstakararnar